# Fíggjarlógin komin undir land

**– Fíggjarlógaruppskotið fer út til samgonguna í dag, og tá næsta vika er av, vænti eg at semja er um uppskotið, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



Eftir at hava sitið í sessinum í ein mánað er Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, við at koma undir land við arbeiðnum at smíðja eitt fíggjarlógaruppskot fyri 2004.

Í vikuni hava fundir verið við øll aðalráðini, har ymsu játtanirnar eru gjøgnumgingnar. Bárður Nielsen vísir á, at tveir tinglimir úr hvørjum flokki hava verið við á hvørjum fundi, og tískil kenna samgongulimir uppskotið, áðrenn tað kemur til viðgerðar á samgongufundi mikudagin. Tí er landsstýrismaðurin bjartskygdur.

– Eg vænti, at uppskotið verður liðugt síðst í næstu viku. Síðan skal tað gjøgnumkannast, reinskrivast og eftirkannast, áðrenn tað kann leggjast fyri løgtingið, sigur Bárður Nielsen.

### Eingi fingramerki

Bárður Nielsen sigur, at av tí at so nógv er liðið av árinum fer politikkurin hjá nýggju samgonguni ikki at merkja fíggjarlógaruppskotið fyri 2004.

– Tað gevur onga meining at skunda nakað ígjøgnum, og effektin av møguligum inntrivum sæst ikki tað stóra aftur í ár kortini, vísir Bárður Nielsen á.

– Tí fara vit í staðin at leggja okkum eftir at fáa okkara politikk at skína ígjøgnum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005, ið verður lagt fram til heystar.

Fíggjarlógaruppskotið, ið Bárður Nielsen fer at leggja fyri løgtingið, byggir í høvuðsheitum á framskrivingar av tølunum fyri 2003, íroknað lønarvøkstur o.a.

### Undirskot

Í vikuni segði Bárður Nielsen, at undirskotið á fíggjarlógini fyri 2004 fer at vera millum 200 og 300 milliónir krónur. Hóast fíggjarlógararbeiðið er komið longri í dag, so vil landsstýrismaðurin ikki seta neyvari tal á.

– Vit rokna framvegis við, at undirskotið verður onkunstaðni millum 200 og 300 milliónir krónur, sigur Bárður Nielsen.

### Vísir ákærum aftur

Bárður Nielsen vil ikki hava sitandi á sær, at hann hevur slongt um seg við tølum um, hvussu stórt undirskotið verður, og á tann hátt verið við til at skapa ótryggleika í samfelagnum.

– Fyri trimum vikum síðan segði eg, at undirskotið fór at vera 400 milliónir, og at tað talið bygdi á reinar framskrivingar og um eingi inntriv fóru at vera gjørd. Tá eg nú sigi at undirskotið fer at vera millum 200 og 300 milliónir krónur, byggir tað á framskrivingar av tølunum fyri 2003, umframt inntriv og sparingar, ið skulu gerast. Hetta eru einastu tøl, ið eru komin frá mær, sigur Bárður Nielsen.

Spurdur, hvørt hann ikki bara kundi bygt sítt uppskot á fíggjarlógaruppskotið frá í heyst sigur Bárður Nielsen, at tað ikki er so einfalt.

– Fleiri øki í tí uppskotinum kravdu stórar lógarbroytingar, og tær er ov seint at gera nú. Harumframt hevur verið neyðugt at endurskoða fleiri játtanir.

– Eitt dømi um hetta er, at í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 vóru einans 67 milliónir settar av til sjúklingaviðgerðir uttanlands. Hetta hóast veruliga útreiðslan av hesum var 92 milliónir krónur í 2003, sigur Bárður Nielsen.

## Sjónleikaraskeið, sum mennir og flytur mørk

Øll sjónleikaraáhugað og onnur áhugað, sum treingja til at bjóða sær sjálvum av, fáa nú ein spennandi møguleika.

Talan er um skeið á Føroya Fólkaháskúla næsta vikuskifti, har sum arbeitt verður út frá einum sjónleikaformi, ið nevndur verður »viewpoint«. Viewpoint er ein improvisatiónsháttur. Í stuttum kann sigast, at útgangsstøðið er at lurta eftir impulsum í sær sjálvum og í sínum medleikarum – at fylgja impulsunum og síðani brúka teir kreativt í einum samanhangi.

Tú fert út á gólv, onki er avtalað frammanundan, so byrjar ein t. d. onkra rørslu, og út frá hesi fyrstu rørslu fáa hini, sum eru á gólvinum, impulsir til at svara aftur, ikki við orðum, men við kroppinum – á hendan hátt verða søgur skaptar.

Umframt í viewpoint verður eisini arbeitt við at styrkja og menna røddina.

Skeiðið er eitt gott høvi til at læra, uppliva, flyta mørk, finna nýggjar síður av sær sjálvum og at hava tað stuttligt.

Lærarar eru leikkonurnar Katarina Nolsøe og Kristina Hansen, sum saman hava verið á skeiði hjá Anne Bogart, upphavskvinnu til viewpoint, í Saratoga Spring uttan fyri New York City.

Tað er Meginfelag áhugaleikara Føroya, ið skipar fyri skeiðinum.

Karsten Hansen:

## Fíggjarlógaruppskotið má í tingið sum skjótast

**– Tað er ein vanlukka fyri samfelagið, at vit framvegis ikki hava nakra fíggjarlóg fyri 2004, sigur Karsten Hansen, fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



Fyrrverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, metir tað vera sera óheppið fyri samfelagið, at einki fíggjarlógaruppskot er lagt fram enn.

- Samfelagið hevur reelt ligið uttan stýring síðan fyrst í desember mánað, og tað er sera óheppið, serliga sum gongdin er nú, sigur Karsten Hansen.

Hann er greiður yvir, at tað tekur tíð hjá nýggja landsstýrismanninum at smíðja eitt fíggjarlógaruppskot, um broytingar skulu gerast.

– Men nú er so langt liðið út á árið, at hann fær ikki gjørt størvegis broytingar. Sambandsflokkurin var fyri ein stóran part fyri fíggjarlógaruppskotinum, ið eg sum landsstýrismaður í fíggjarmálum legði fram í heyst, og tískil átti at borið til at gjørt nakrar broytingar í tað uppskotið og síðan lagt tað fyri løgtingið. Síðan kundu aðrar broytingar verið gjørdar so við og við, metir Karsten Hansen.

Karsten Hansen metir, at við sínum skiftandi útmeldingum um, hvussu stórt undirskotið verður á fíggjarlógini, er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum við til at skapa ein ótryggleika í samfelagnum

– Undir samgongusamráðingunum frættist, at undirskotið fór at vera 500 milliónir krónur. Seinni hevur talið 400 milliónir verið nevnt, og nú sigur landsstýrismaðurin so, at undirskotið verður 200-300 milliónir, sigur Karsten Hansen og heldur fram:

– Eg haldi tað vera sera óheppið og skapar ein ótryggleika at koma út við leysum tølum um fíggjarligu støðuna. Úrslitið gerst einans, at øll sláa bremsurnar í, og eingin torir nakað. Og tað ger so einans støðuna verri, leggur Karsten Hansen afturat.



UTTAN ÚR HEIMI




*Hendan myndin hevur fingið øði í nógvar amerikanarar*

# Bush misnýtir 11/9 í valstríðnum

**Bush, forseti, nýtir myndir av leivdunum av World Trade Center og bjargingararbeiðinum í sínum valreklamum, og tað hevur loypt øði í avvarðandi og bjargingarfólk**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Hetta er andstyggiligt. Tað er sum at nýta ein gravstein í einum politiskum átaki. Ground Zero, har World Trade Center stóð, er í mínum eygum ein gravstaður, sigur Coleen Kelly, sum er formaður í felagsskapinum "Peaceful Tomorrows", ið er ein felagsskapur hjá avvarðandi hjá teimum, sum doyðu í atsóknini 11. september í 2001.

Felagsskapurin og ein fakfelag hjá amerikonskum bjargingarmonnum hava biðið forsetan taka sjónvarpslýsingina aftur.

– Forsetin eigur at biðja avvarðandi hjá bjargingarmonnunum, sum doyðu í World Trade Center, um umbering, tí hann hevur vanærað minni teirra fyri at vinna sær sjálvum stuðul, stóð í einari kunngerð frá bjargingarmannafelagnum.

Sjónvarpslýsingarnar hjá Bush komu á skíggjan í 18 statum fyrrakvøldið. Tað eru heldur ikki øll, sum halda, at forsetin hevur gjørt nakað skeivt. Summi halda, at hann hevur rætt til at vísa á síni leiðaraevni aftan á atsóknina fyri hálvum triðja ári síðani.

# Irak er bara byrjanin

**Allastaðni verður tosað um ætlanina at demokratisera Irak, men fá geva sær far um, at USA longu leggur ætlanir um stórar broytingar í øllum Miðeystri - ætlanir, sum hava fingið fleiri leiðarar at stúra**

BROYTINGAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í síðstu viku var amerikanski embætismaðurin Alan Larson í egyptiska høvuðsstaðnum Kairo. Hann er ein av teimum fremstu embætismonnunum í Bushstjórnini, og ørindini vóru at kunna egyptiska leiðsluna um eitt amerikonsku ætlanina um eitt øðrvísi Miðeystur. Ætlanin, sum amerikanarar nevna "Tað stóra Miðeystur-átakið", ber millum annað í sær, at skúlaverkið skal nútímansgerast, meiri ferð skal á búskapin, og demokratiseringin skal stimbrast. Men arabar eru ikki serliga hugtiknir av henni.

– Vit eiga ikki at lata onnur avgera framtíð okkara, áseta kós okkara ella nýskipa okkum, segði egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, við blaðið Al Ahram fyri nøkrum døgum síðani. At Mubarak óttast amerikonsku ætlanina kemur ikki óvart á nakran, tí hann hevur í áravís roynt at sannføra Vesturheimin um, at sat hann ikki við valdið í Kairo, hevði ein uppaftur verri einaræðisharri sitið har.

### Saddam-stuðul

Amerikanska ætlanin hevur havt við sær, at arabar eru farnir at tosa um møguleikarnar fyri einari demokratisering, og av og á hoyrast røddir, sum tala fyri at royna eina nýggja kós. Men tey flestu vísa ætlanini frá sær av teirri einføldu orsøk, at hon hevur sín uppruna í USA, og serliga í Egyptalandi og Sýrialandi fáa hesar atfinningarsomu røddirnar stuðul frá teimum ráðandi. Tí tá til stykkis kemur, eru tað teir, sum hava mest at missa.

Illgrunin um fremmanda uppílegging kann, tá saman um kemur, gerast tað, sum forðar fyri nýskipanum. Tá Saddam Hussein bleiv tikin í kjallaranum í Tikrit, vildu nógvir arabar vera við, at amerikanararnir royndu at eyðmýkja hann, og tí kann tað henda, at Saddam hóast sínar illgerðir er við til at stuðla teimum einaræðiskendu stýrunum í tí arabiska heiminum.

Samstundis er tað ein veruleiki, at hugsjónir úr Vesturheiminum hava ikki bara gagnað londunum í Miðeystri. USA tosar um at nútímansgera alt økið, men trupulleikin er, at nýskipanir í 20. øld miseydnaðust, og at tær í stóran mun hava styrkt fleiri av teimum einaræðiskendu stýrunum. Fyrr plagdu teir arabisku leiðararnir at spyrja seg fyri hjá fólkinum, áðrenn teir tóku týðandi avgerðir, men nýskipaninar, sum í mestan mun komu úr Evropa, gjørdu enda á tí siðinum. Úrslitið varð ein miðsavnað stýring ella uppaftur størri einaræði.

### Eingin andstøða

Við nýskipanunum batnaðu samferðslumøguleikarnir, samskiftið batnaði, og seinast, men ikki minst, batnaðu vápnini. Tað gav teimum ráðandi uppaftur størri vald, og alt stýrið bleiv enn meiri miðsavnað. Í Irak kom Saddam til valdið við hjálp frá einum politiskum flokki, sum eisini var eitt hugskot úr Evropa.

Ikki tí, amerikanska ætlanin um demokratisering hevur ein ávísan grundvøll at byggja á í Miðeystri, men trupulleikin er, at í teimum flestu londunum hava tey einaræðiskendu stýrini langt síðani gjørt av við at kalla alla politisku andstøðu. Tað hevur havt við sær, at í dag eru tað ter vígdongdu átrúnaðarligu kreftirnar, sum eru tær best skipaðu, og sum hava størstu ávirkanina á tað vanliga fólkið. Júst hetta kann fara at vísa seg at vera vandamikið, tá val verður í Irak.

# Ísraelsmaður tikin fyri yvirgang

**Ein 22 ára gamal ísraelsmaður er tikin og skuldsettur fyri fleiri yvirgangsatsóknir at arabarum, sum búgva í Ísrael**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Løgrteglan vil millum annað vera við, at maðurin hevur skipað fyri atsóknum at arabiskum limum í ísraelska tjóðartinginum.

Í íbúðini hjá manninum fann løgreglan fleiri skotvápn og fleiri kuffert, sum vóru full av spreingievni. Maðurin býr saman við foreldrunum í Haifa har norðuri í Ísrael, og sambært løgregluni hevur hann gjørt fleiri bumbur tey seinastu árini.

Millum annað vil løgreglan vera við, at tann 22 ára gamli maðurin legði eina bumbu undir bilin hjá arabiska tingmanninum Issam Makhol í 2001. Bumban brast, tá kona tingmannin setti seg í bilin, men eingin fekk kortini skaða. Løgreglan heldur, at tann 22 ára gamli hevði lagt ætlanir um at søkja at trimum øðrum arabiskum limum í ísraelska tjóðartinginum. Hann er eisini undir illgruna fyri at hava lagt nøggju bumbur ymsastaðni í heimbýnum Haifa.

Maðurin hevur greitt løgregluni frá, at hann hatar arabar og allar jødar, sum halda av arabum.

